Lagt til rættis:Eyðun Klakstein

Í stuttum

# Biohøllir fáa eftirlitstól

Nordisk Film hevur sett heili 220 videotól upp í sínum kykmyndahøllum. Hesi tól skulu hava eftirlit við teimum mongu gestunum, sum hvørja viku hyggja eftir filmi í einum av biohøllunum hjá Nordisk Film í Danmark.

Sambært menningarleiðaranum hjá Nordisk Film, Stig Jørgensen, verða tólini sett upp, so at fólk kenna tað trygt at fara í biograf.

- Fyri okkum merkir videoeftirlit tryggleiki. Vit royna at forða fyri, at nakar ger seg inn á okkara gestir, sigur hann við Ritzau.



Videotólini verða ikki sett upp í í sjálvum salinum, har filmirnir verða sýndir, men alla aðrastaðni í biohøllunum.

# Hollywood vassar í pengum

Amerikanski filmsídnaðurin hevur ongantíð áður vunnið so nógvar pengar, sum hann ger nú, og útlit eru fyri, at tað skal ganga enn betri næstu árini.

Blaðið Daily Variety skrivar, at í 2006 komu 25,8 milliardir dollarar í kassan hjá stóru filmsframleiðarunum í Hollywood, og tað var 11 prosent meira enn árið fyri.

Støra økingin í inntøkunum kemur serliga frá øktum sýningum av Hollywood-filmum uttanfyri USA.

Stjórin fyri felagið hjá filmsframleiðarum roknar við, at 2007 verður eitt enn betri ár, enn 2006 var.



*Tað gongur strúkandi hjá amerikanska filmsídnaðinum, sum nærum vassar í pengum*

# The Police aftur á pallin



*The Police kann nú aftur upplivast á palli kring Europa*

Bretsku bólkurin The Police, sum fyri 20 árum og meira taldist millum mætastu poppbólkar í Europa fer nú at spæla aftur á konsertum. Høvuðsmaðurin í bólkinum, Sting, er framvegis á odda fyri The Police, sum í síni tíð hevði stór hitt við sangum sum Every Breath You Take, Message In A Bottle og Roxanne.

The Police fer eisini at spæla í norðurlondum, og konsertin í Danmark verður hildin í Århus tann 1. september. Roknað verður við sera stórum áhuga fyri konsertunum hjá The Police í Europa.

## Mr. Bean í Australia



*Fólk á Bondi Beach fingu gott undirhald, tá ið Mr. Bean legði leiðina fram við mikudagin (Mynd: Scanpix)*

Fólk í Sydney fingu forkunnuga vitjan nú um dagarnar. Eingin annar er Mr. Bean leitaði sær ein túr á kendu Bondi Beach. Har gekk skemtiligi bretin og mól eina løtu, meðan myndamenn og onnur kundu taka myndir av honum. Sjónleikarin Rowan Atkinson, sum spælir Mr. Bean, var í Australia í sambandi við, at seinasti filmurin hjá honum, Mr. Bean's Holiday, verður frumsýndur í Australia tann 19. mars.

## Donsk fongsul á tremur við fólki




Geglini í danska høvuðsstaðnum eru á tremur á fólki, og nú mugu myndugleikarnir skjótt seta fólk á bíðilista fyri at sleppa í fongsul at sita revsing av sær.

Tað er ófriðurin í Keypmannahavn seinastu dagarnar, sum nú hevur við sær, at fongslini eru við at fyllast av fólki, sum eru varðhaldsfongsla. Um løgreglan næstu dagarnar fer at handtaka nógv fólk afturat, sum skulu inn at sita í styttri tíð, verður tað ein trupulleiki fyri fongsulsmyndugleikarnar.

Ritzau skrivar, at tað er pláss fyri 100 fólkum afturat í Keypmannahavn.